# Maria Guttesen hevur fingið plátusáttmála

**Føroyska songkvinnan Maria Guttesen og tónleikabólkur hennara, Divided Minds, koma tann 21. juni á føroyska marknaðin við nýggjari fløguútgávu, við heitinum The Last Night**



TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Á fløguni eru 12 spennandi løg, sum Maria bæði hevur verið við til at smíða og framleitt. Ein blandingur av sorgblíðum - saman við hugløddum, lívligum songum, allir við hugfangandi niðurløgum.

Eitt forvitnisligt, inniligt og eitt sindur øðrvísi ljóð, ið Maria Guttesen, við síni sermerktu rødd, megnar at frambera á sín heilt serliga hátt.

Hetta er gløggur og fjølbroyttur popprokkur, ið spennir víða, líka frá tí bleytasta til tann harðasta rokkin.

Maria syngur sjálv øll løgini og hon spælir eisini fleiri ljóðføri.

Upptøkurnar eru gjørdar í MediaMusic í Keypmannahavn, í Julian F Studio og Steeven Studio í Århus.

Tað er danska plátufelagið Cope Records, sum gevur fløguna út og hava tey stórar vónir fyri hesi fløgu. Ikki so løgið, tí løgini og tekstirnir eru framúrskarandi, eins og ljóðframleiðslan og tónleikarnir eru á sera høgum støði.

Fyrsta stakfløgu útspæli, A Better Today, er komið inn á playlistan hjá P3 á Danmarks Radio, so allir møguleikar fyri at røkka langt eru til staðar.

Í Mars mánaði var hesin sangurin við á Gaffa-fløguni og tónleika-felagskapurin SoundVenue hevur eisini biði um at fáa sangin við á teirra summar-fløgu.

Meira fæst at vita um Mariu Guttesen og Divided Minds á heimasíðuni www.dividedminds.dk, har eisini tónleikur av fløguni eru at hoyra.

Tað er útgávufelagið Tónleikur, ið gevur fløguna út í Føroyum, og hon fæst í handlunum nú.



*Fyrsta pisan í Hoydølum í summar, Åsa Christiansen. Her stendur hon saman við stoltu foreldrunum, Birgith og Krisjan Christiansen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Åsa Christiansen, fyrsta pisan:

# Deiligt og løgið

**Mánamorgunin varð tann fyrsta pisan floygd í Hoydølum**

STUDENTASKÚLI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað var ikki sørt við blandaðum kenslum, at 19 ára gamla Åsa Christiansen kundi kalla seg fyri student.

Beint áðrenn klokkan níggju mánamorgunin fekk hon nevniliga húgvuna á høvdið, og gjørdist sostatt fyrsta floygda pisan í Hoydølum í ár.

– Tað kennist bæði løgið og deiligt, at hetta er yvirstaðið, segði Åsa, eftir hon kom út frá seinastu próvtøkuni í religión.

Hon leggur afturat, at tað er bæði fríandi og syrgiligt, at kapitullin í Hoydølum er yvirstaðin.

### Steðg

Framtíðarætlanirnar hjá Åsu eru framvegis ikki heilt vissar. Hon ætlar fyrst og fremst at halda ein steðg eftir at hava gingið í skúla í 13 ár á rað.

– Eg veit ikki nær ella hvat eg ætli mær at lesa víðari, men tað verður einaferð, sigur hon við einum smíli.

Í summar verða annars floygdar beint yvir 100 pisur í Hoydølum.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 26, 2004
www.kaupthing.fo

# Rentuhækkingin verður hóvlig

MARKNAÐARRÁK

Stórstu hendingarnar í farnu viku vóru, at prísvakstrartøl vóru kunngjørd og at stjórin í FED Alan Greenspan helt røðu í amerikanska senatinum. Hesar hendingar fingu sera stóra ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar og førdu við sær skiftandi kursstig.

Vøksturin í nýtsluprísum og framleiðsluprísum, um hesir verða reinsaðir fyri orku og matvørur, vístu eina ymiska mynd. Nýtsluprísirnir gjørdust lægri enn væntað, meðan framleiðsluprísirnir gjørdust hægri enn væntað. Serliga nýtsluprísirnir fingu ávirkan á marknaðirnar so at lánsbrævarentur lækkaðu heilt fitt og partabrøv hækkaðu. Framleiðsluprísirnir fingu øvutu ávirkanina, hóast hendan ikki var eins ógvuslig.

Røðan, ið Greenspan helt eftir kunngerðina av nýtsluprísunum var áhugaverd. Greenspan legði dent á, at eingin vandi var fyri ógvusliga hækkandi prísvøkstri í næstum, og at rentuinntrivini hjá FED fóru at verða hóvlig. Av tí at marknaðirnir frammanundan óttaðust minni hóvlig inntriv frá FED, lækkaðu eisini stytru lánsbrævarenturnar.

Kaupthing væntar at hendan vikan gerst friðarlig. Orsøkirnar eru tvær. Fyri tað fyrsta eru hópin av marknaðarluttakarum farnir í summarfrí og fyri tað næsta, er sera tunnligt við búskaparligum kunngerðum hesa vikuna. Umframt at talið av teimum, ið fyrstu ferð søkja um arbeiðsloysisstuðul í USA, verður kunngjørt, er tað at kalla einans týska vinnuálitið (IFO), ið verður kunngjørt. Væntað verður at álitið hjá týsku vinnuni um verandi og komandi gongd hækkar, men ávirkanin á marknaðirnar verður væntandi avmarkað.

Av øðrum viðurskiftum, ið tala fyri at vikan gerast friðarlig eru, at fríggjadagin hava Svøríki og Finnland afturlatið, og kanska meira týdningarmikið er, at allir marknaðir bíða eftir at amerikanski tjóðbankin hevur rentufund mikudagin í næstu viku. Tá fer FED at hækka teirra leiðandi rentu við 0,25%. Hækkingin sjálv fer neyvan at ávirka marknaðirnar, tí ein slík er væntað. Áhugaverdari verður hvørji tíðindi FED fer at bera fram á fundinum.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,87% | -0,05% |
| 5 ára lánsbræv | 3,95% | -0,06% |
| 10 ára lánsbræv | 4,54% | -0,05% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 261,9 | 1,9% |
| OMX, Svøríki | 683,1 | 0,8% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.748,2 | 2,2% |
| S&P 500, USA | 1.135,0 | 0,9% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,07 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 164,63 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 78,10 | 1,0% |
| Altjóða Vøkstur | 64,41 | -0,4% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 614,26 | -0,4% |
| EUR | 743,23 | 0,0% |
| GBP | 1.125,51 | 0,8% |
| NOK | 88,96 | -0,4% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Frítíðarperla forboðin fyri føroyingum

**Hóast danska uttanríkisministeriið hevur staðfest, at føroyska passið gevur somu loyvi sum tað danska, so sleppur tú ikki inn í Libanon, um tú hevur »Føroyar« á passinum**




Vakrar sjónvarpslýsingar á altjóða tíðindarásunum hava seinastu tíðina roynt at víst á Libanon, sum frítíðarperluna í Miðeystri. Eitt blómandi og nýmótans Beirut, azurblátt Miðjarahav, skíítróttarstøð og ein rúgva av søguligum støðum og bygningsverkum eru millum annað tað, sum skal lokka ferðafólk hendavegin.

Men fyri føroyingar er tó eitt stórt minus í øllum hesum. Føroyskir gestir sleppa nevnliga ikki inn í landið.

Bara hendan seinasta mánaðin eru fleiri føroyingar – sum ikki hava verið í sama ferðalagi – blivnir steðgaðir við libanesiska markið, har tað hevur verið noktað teimum at sleppa inn.

So seint sum sunnudagin ætlaðu Guðrun Rógvadóttir, maður hennara og bæði børnini hjá teimum sær inn í landið. Maðurin hevur danskt pass, so hjá honum var eingin trupulleiki, men tá Guðrun vísti grøna føroyska passið hjá sær, varð sagt stopp.

– Hetta var eitt stórt vónbrot. Vit høvdu bílagt kamar á gistingarhúsi, og undan hesum høvdu vit eisini lisið eina rúgvu um landið, so vit gleddu okkum sjálvandi til ferðina. Men brádliga stóðu vit í ongamannalandi. Millum Syria og Libanon við tveimum børnum og viðførinum. Bussurin hjá okkum var farin víðari inn í Libanon, sigur Guðrun.

Við fartelefonini fekk fatur á donsku ambassaduni í Damaskus, sum kundi siga teimum, at eisini aðrir føroyingar vóru burturvístir við markið orsakað av grøna passinum. Men hóast tey vóru vitandi um hetta, so er mistakið ongantíð rættað.

Tað eydnaðist okkum tó ikki at fáa fatur í donsku sendistovuni undan evstamarki okkara.

Guðrun sigur, at sambært teimum embætismonnum, sum stóðu við markið, kundi Libanon ikki góðkenna føroyska passið, hóast teir høvdu hópin av upplýsingum um landið.

Millum annað vistu menninir at siga, at í Føroyum búleikaðust um 47.000 fólk á 18 oyggjum. Men sambært einum innanhýsis skjali – skrivað á arabiskum – sum varð víst húskinum, so verður grøna føroyska passið ikki góðkent í Libanon.

Guðrun og maðurin fingu eisini fatur á danska uttanríkisminesteriinum. Haðani varð alt fyri eitt sent eitt skriv, har tað varð staðfest »...that passport issued by the Faroe Islands authorities is as valid as regular Danish passport«.

Meðan hjúnini bíðaðu, var alt málið sent til ovastu trygdarmyndugleikarnar í Libanon, men hetta hjálpti tó einki. Passið varð ikki góðkent, og ætlaði húskið sær um markið, so mátti tað verða uttan føroysku mammuna.

Endin á øllum varð, at familjan mátti finna sær ein nýggjan buss at seta seg í. Hesaferð við kós móti Damaskus í Sýrialandi.

– Eg havi áður upplivað, at fólk hava spurt meg um passið. Men hetta er so fyrsta ferðin, at mær er noktað innferðarloyvi til eitt land, sigur Guðrun, sum dagliga starvast hjá donsku ráðgevingarfyritøkuni, EURA, og í hesum sambandi vanliga ferðast nógva staðni kring allan heimin.

# Felagið eitur Set

Tíðindaskriv

Set P/F, ið varð stovnað av framtaksfeløgunum Notio, Framtaksgrunninum og Sparikassagrunninum, byrjaði sítt virksemi í januar 2003 og hevur sostatt virkað í eitt knapt ár. Endamálið við felagnum er á vinnuligum grundarlagi at seta váðafúsan íbirtingarpening í verkætlanir og hugskot, sum hava góðar møguleikar fyri einum munandi búskaparligum avkasti.

Set P/F hevur síðan stovnan gjørt íløgur í 3 feløg, og arbeiðir í løtuni við fleiri øðrum spennandi íløguætlanum. Felags fyri tær íløgur, sum SET P/F ger er, at tær verða framdar í hugskotsfasuni hjá einari fyritøku, t.e. áðrenn fyritøkan veruliga er komin ígongd.

Nevndin metir, at útlitini eru góð fyri at felagið kemur at hava týdning fyri nýskapan innan føroyskt vinnulív. Felagið vil frameftir eisini virkið royna at finna nýggj hugskot at seta pening í, sum SET metir kunna geva eitt munandi avkast í framtíðini.

# Broyting í lógini

Tíðindaskriv

Løgtingið gjørdi í 2002 ymsar broytingar í rentutryggingarlógini. Tann broyting, sum hevur týdning fyri arbeiðsgevarar og løntakarar, er broytingin viðvíkjandi frádrátti fyri eftirlønarinngjøld hjá løntakarum.

Arbeiðsgevarar skulu nú gjalda løntakarans part av eftirlønargjøldum uttan um afturhaldsskipanina til eftirlønarkontu hjá løntakarum.

Av tí at eftirlønargjøld nú verða goldin óskattað inn á eftirlønarkontu, skulu løntakarar ikki longur draga hetta gjald frá skattskyldugu inntøkuni.

Løntakarar, sum hava arbeiðsgevaraeftirlønarskipan og bert hava A-inntøku og ongan skattligan frádrátt, sleppa soleiðis heilt undan at lata sjálvuppgávu inn. Teir fáa framskundaða skattauppgerð, sum Toll- og Skattstovan ger út frá upplýsingum í skattaskráunum.

Flestu arbeiðsgevarar hava tillagað seg eftir hesari broyting, men enn eru tó nakrir, sum ikki hava gjørt tað. Toll- og Skattstovan fer tí at heita á hesar arbeiðsgevarar, sum ikki hava broytt mannagongd, at fáa hetta í rættlag beinanvegin.

Víst verður til lógarbroyting, løgtingslóg nr. 40 frá 26.03.2002 um broyting í rentutryggingarlógini við gildi frá 10.04.2002.

UPP & AFTURLATINGARTÍÐIR

Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini, undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 21/6-2004 til leygard. 7/8-2004



Tíðirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Týsdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Mikudag | kl. 06:45 - 09:00 |
| Hósdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Fríggjadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Leygardag | kl. 09:00 - 17:00 |
| Sunnudag | kl. 08:00 - 10:00 |
| & | kl. 14:00 - 17:00 |

SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI
Hoydalsvegur 21 · Tel 311550